# Summarmótin er leysur

MÓTI
*Jákup Mørk*



*Vera Larsen vinstrumegin og Karin Sólsker høgrumegin eru her avmyndaðar saman við Sit, sum var ein av kendu skeiðshaldarunum hjá Vidal Sassoon*

Assymetriskar klippingar. Kanska nakað óskipað við stuttum paguhári og nakað av lokkum.

Hetta er millum annað tað, sum í summar verður partur av summarmótanum, tá tað ræður um hár og hársnið.

Tær báðar, Vera Larsen av Vera Klip og Karin Sólsker úr Karin'sa hava fyri stuttum verið á skeiði hjá stóru mótaskaparunum á Vidal Sassoon í London, har tað fyrst og fremst var summarmótin, sum var á skránni.

Tað at taka lut á skeiðum av ymsum slag, hevur seinastu nógvu árini verið ein fastur partur av arbeiðinum hjá hárfríðkum kring alt landið, men hetta er helst fyrsta ferðin, at føroyskar hárfríðkunarkvinnur hava leitað sær beinleiðis til stóru mótaskapararnar.

Ofta hevur gongdin heldur verið tann, at kendir danir frá eitt nú Gunn-Britt, Stuhr og Wella Studio leita sær til London og París, og at hesi síðani halda skeið fyri fólkum í eitt nú Føroyum.

Við at fara beinleiðis til mótakelduna halda tær báðar tó, at bæði kunnleikin og ajourføringin av hesum verður á einum enn hægri stigi.

- Vit sleppa jú undan einum millumliði, tá gjørt verður á hendan hátt. Er talan t.d. um skeið, sum danir halda, so byggir hetta sjálvandi á tað, sum tey hava lært eitt nú hjá Vidal Sassoon, men tey bera sjálvandi bara ein part av vitanini víðari. Tann partin, sum tey velja at leggja størsta dentin á. Við at taka lut á skeiðnum her í London, fáa vit alt skeiðið við, og tí verður tað í størri mun upp til okkum at velja, hvørjar partar av hesum vit vilja gera nýtslu av, sigur Karin Sólsker, sum annars helt talan vera um eitt framúr væl fyriskipað skeið.

Skeiðið, sum tær báðar vóru partur av, var sonevnda Advanced Academy, har evnið var summarmótin. Og hesin verður í ár nevndur Romantic Heroine - the Classy English Rose.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av suðri og regn, seinnapartin upp í ein strúk av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, menn mjørkaflókar. Hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og stundum regn. Móti kvøldi minni vindur av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 15 og 18 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 15 og 18 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, eitt skifti upp í hvassan vind. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 16 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 7 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | -- |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 17 |
| London | 20 |
| Tromsø | 20 |
| Bergen | 17 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 21 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 20 |
| Warzawa | 23 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 16 |
| Paris | 24 |
| Madrid | 33 |
| Róm | 31 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 29 |
| Malta | 28 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 35 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 16 |
| New York | 25 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 20 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 998 hPa. við Føroyar fer í útnyrðing. Eitt annað lágtrýst, 1015 hPa. yvir Atlantshavinum fer móti Íslandi og dýpist. Brúgvalagið haðani verður við Føroyar hósdagin.




**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Ísland fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjadagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 4/7 kl. 06[00]– 5/7. 06[00]. Hitin í gjár: 10,3°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 25,6°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 4/6 kl. 06[00]– 5/7 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 25,7 mm

**Vika 26 – 3. juli**

1. Centrum:
**30 - 12 - 23 - 48 - 10 - 72 - 49 - 11 - 52 - 74 - 01 - 70 - 31 - 43**

1. Ramme:
**63 - 36 - 07 - 35 - 29 - 41 - 33 - 40 - 50 - 71 - 47 - 08 - 14 - 44 - 19 - 38 - 65 - 75 - 27 - 59 - 60 - 37 - 03 - 53 68**

Fuld plade:
**39 - 58 - 13 - 22 - 46**

Fri spil: __**XEN**

| | | |
|---|---|---|
| Fuld plade: | 1. pr. | **124.076,- kr.** |
| 1. Ramme: | 2. pr. | **10.723,- kr.** |
| 1. Centrum: | 3. pr. | **5.376,- kr.** |
| Ramme: | 4. pr. | **1.455,- kr.** |
| Centrum: | 5. pr. | **31,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

Sosialurin

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 5. juli | Jørðin longst frá sólini |
| 6. juli | Tendring |
| 8. juli | Mánin longst frá jørðini |
| 14. juli | Fyrra kvarter |

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. Juli | 08.20 | 20.45 | 07.20 | 19.45 | 07.35 | 20.00 | 10.20 | 22.45 | 11.20 | 23.45 | 06.35 | 19.00 | 05.35 | 18.00 | 08.35 | 21.00 | 09.35 | 22.00 | 08.05 | 20.30 | 09.20 | 21.45 |
| 8. Juli | 09.07 | 21.30 | 08.07 | 20.30 | 08.22 | 20.45 | 11.07 | 23.30 | - | 12.07 | 07.22 | 19.45 | 06.22 | 18.45 | 09.22 | 21.45 | 10.22 | 22.45 | 08.52 | 21.15 | 10.07 | 22.30 |
| 9. Juli | 09.49 | 22.09 | 08.49 | 21.09 | 09.04 | 21.24 | 11.49 | - | 00.30 | 12.49 | 08.04 | 20.24 | 07.04 | 19.24 | 10.04 | 22.24 | 11.04 | 23.24 | 09.34 | 21.54 | 10.49 | 23.09 |
| 10. Juli | 10.27 | 22.46 | 09.27 | 21.46 | 09.42 | 22.01 | 00.09 | 12.27 | 01.09 | 13.27 | 08.42 | 21.01 | 07.42 | 20.01 | 10.42 | 23.01 | 11.42 | - | 10.12 | 22.31 | 11.27 | 23.46 |
| 11. Juli | 11.03 | 23.20 | 10.03 | 22.20 | 10.18 | 22.35 | 00.46 | 13.03 | 01.46 | 14.03 | 09.18 | 21.35 | 08.18 | 20.35 | 11.18 | 23.35 | 00.01 | 12.18 | 10.48 | 23.05 | - | 12.03 |

5 707265 100043 >